Bústevnan

HÚS & INNBÚGV

Í ítróttarhøllini í Runavík

4. – 6. apríl 2003

Entreprenørar • Arkitektar og teknistovur • Peningastovnar
Tryggingarfyritøkur • Byggimeistarar • Timburhandlar
Sniðhúsaframleiðarar • Snikkaravirki og vindeygaframleiðarar
VHS - innleggarar • EL - innstallatørar • Málarar • Múrarar
**Handilsfyritøkur:** VHS, EL, Køkar, Baðirúm, Hvítvørur, Møblar og innbúgv

HÚS & INNBÚGV
Postboks 84 • FO-620 Runavík
Tel 44 99 49 • Fax 44 98 48
Fartel 21 19 49
heimasíða: www.bustevnan.fo
e-mail: info@bustevnan.fo











FILMSTEIGURIN

# Daredevil

Í tí heimi, hann livur í, er altíð nátt – men myrkrið er fylt við ljóði, anga og smakki, sum tey flestu ikki skilja. Gott nokk er Matt Murdock, advokatur, blindur, men hini fýra sansir hansara virka óalmindiliga væl.

Um dagin stríðinst Murdock í rættarsalinum fyri tey kúgaðu; um náttina er hann Daredevil – Maðurin uttan ótta – ein maskumaður, náðileysur hevnari, sum lúrir í stórbýarins myrku gøtum og tryggjar, at rættvísi má sigra.

Tí rættvísi er, sum okkum øllum kunnugt, eisini blint, og sum Daredevil sigur við brotsmenninar, ið ganga fríir: »Eg vóni, at tú finnur rættvísi, áðrenn rættvísið finnur teg!«

Daredevil er tann nýggjasti í røðini av Marvel Comic's superhetjum, sum nú fær sín egna stórsligna spælifilm – eftir Batman, X-Men, Blade og Spider-Man.

Skaparin av Daredevil er Stan Lee, sum fylti 80 í desember. Hann var redaktørur hjá Marvel Comics í 1972, og umframt Daredevil hevur hann eisini havt ábyrgdina av røðunum um Spider-Man, the Incredible Hulk, the Fantastic four, Iron Man, X-Men, silver Surfer og Dr. Strange. Lee er soleiðis tann bakmaðurin við størstari ávirkan í allari teknirøðarsøguni. Navn hansara hevur figurerað á milliardum av teknirøðarheftum í 75 londum, og bara í Evropa verða seldar yvir 35 milliónir hefti árliga. Og eins í væleydnaðu projektunum frammanundan er Lee sjálvandi aftur beinleiðis við sum executive producer.



Drongurin Matt Murdock (Scott Terra) veksur upp hjá pápanum, tí avdankaða boksaranum, Jack »The Devil« Murdock (David Keith). Tá faðirin vinnur ein dyst, sum promotorur hansara hevði lagt til rættis, at hann skuldi tapa, er revsingin, at hann verður bukaður í hel. Tá Matt finnur deyða pápa sín, flýggjar hann í panikki og verður orsøk til eina ólukku, har hann verður raktur av einum radioaktivum útláti, sum kostar honum sjónina.

Sum vaksin mennir Matt (Ben Affleck) hinar sansir sínar (hoyri-, lukti-, og følisansin) til eina perfektión, sum kompenserar hansara breki. hann »sær« við hjálp frá ljóðvibratiónum, og hjartarútmur frá øðrum menniskjum eru fyri hann eitt eins vist samleikapunkt, sum fingramerki og dna-royndir eru hjá løgregluni.



Hann vígir lív sítt til dystin fyri rættvísi.

Hann verður juristur og letur saman við vininum Franklin »Foggy« Nelson (Jon Favreau) eina sakføraraskrivstovu í Hells Kitchen – í slummbýlinginum, har hann vaks upp. Og tá tað eydnast teimum kriminellu at snýta rættarskipanina, umskapar hann seg um náttina til Daredevil, ið nú fer til verka og tryggja, at rættvísi má sigra. Tað góða móti tí ónda, rættvísa móti sjálvtekt er tann moralska tvístøðan, sum Matt Murdock hvønn dag má stríðast við, og sum ger hann meira tryktan og depprimeraðan enn flestu av hinum superhetjunum.




**Frumsýning**
Fríggjadagin 28.03. kl. 19[00]
Fríggjadagin 28.03. kl. 23[30]
Leygardagin 29.03. kl. 21[15]
Sunnudagin 30.03. kl. 20[00]
Fríggjadagin 28.03. kl. 21[15]
Leygardagin 29.03. kl. 19[00]
Leygardagin 29.03. kl. 23[30]
Sunnudagin 30.03. kl. 22[15]

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**

**HAVNAR BIO**
Tlf. 31 19 56
www.bio.fo




**Billettprísur: 70,- kr.**
Fríggjadagin 28.03. kl. 22[30]
Leygardagin 29.03. kl. 22[30]
Sunnudagin 30.03. kl. 22[00]




Fríggjadagin 28.03. kl. 19[30]
Leygardagin 29.03. kl. 19[30]
Sunnudagin 30.03. kl. 19[00]

**KOMANDI FILMUR**




**Frumsýning Fríggjadagin 04.04.**